ítróttur

Nr. 178 • leygardagur • 18. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Møttu »Røddini«

Fagnaðurin var ovurstórur, tá tað vísti seg, at talan var um sama útvarpsmannin, sum sjálvur annar varpaði út frá Landskrona á sinni

Mynd: Álvur Haraldsen

Týskir føroyavinir gjørdust bæði bilsnir og hugtiknir, tá teir í Basel hittu kenda føroyska útvarpsmannin

FERÐAUPPLIVING
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tá ferðast verður við fótbóltslandsliði okkara kemur mest sum ikki fyri, at ikki onkur útlendingur hevur leitað sær til staðið, soleiðis at hesi kunnu fylgja liðnum, sum onkursvegna hevur fangað teirra alsk.

Soleiðis var eisini Í Basel. Meðan vit báðir, myndamaðurin, spákaðu okkum runt í býnum á dystardegnum, sóu vit brádliga nakrar áskoðarar í føroyskum landsliðsbúna sita við eina café.

Skjótt var at fáa eitt prát í lag, og tað vísti seg, at hetta vóru týskarar, sum fyri fyrstu ferð vóru farnir á fótbóltsferð við tí í hyggju at stuðla føroyska landsliðnum. Allir búðu teir nærhendir Nürnberg, so teinurin í bili hevði verið so hampuliga yvirkomuligur.

Áhugin fyri okkara monnum stavaði frá fjør summar, tá teir vóru millum tey mongu týsku viðhaldsfólkini, sum leitaðu sær til Føroya. Sum so varð hetta gjørt, tí teir vildu stuðla sínum landsmonnum, men hetta broyttist tó skjótt.

– Vit fullu alt fyri eitt fyri Føroyum og føroyingum. Tað var ein fantastiskur bliðskapur, sum vit møttu haruppi. Og so gjørdi tað einki sum helst, at vit ikki búðu í Havnini, søgdu teir mest sum við ein munn.

Ístaðin varð bústaður teirra hesar dagarnar í Hvalvík, og tað hildu teir eisini vera í fínasta slag. Ikki minst tá limir í tólvta manni samstundis høvdu verið somikið vinsælir, at teir høvdu koyrt týsku áskoðararnar ein túr king oyggjarnar.

Kenda røddin

Soleiðis varð tosað um leyst og fast, og teir vóru ikki sørt ernir, tá tosið fall inn á búnar teirra. Einki við nøkrum av gomlu búnunum. Nei, spildurnýggir búnar, sum landsliðið fyri fyrstu ferð leikti í í Basel. Og tað gjørdi tað so ikki minni skemtiligt, at ein neyðar gøtuseljari kom spákandi við bæði sveisiskum og føroyskum turrikløðum, sum hesin royndi at selja.

– We only buy original stuff. Not grams! var avgjørda svarið, sum neyðars sølumaðurin fekk omanyvir seg.

Meðan vit soleiðis sita og práta, kemur eitt kent føroyskt andlit framvið. Útvarpsmanningin var eisini farin út at strekkja beinini, nú tímarnir til dystin styttust, og eftir at hava greitt Jógvani frá, hvørjir mennninir vóru, fáa teir so eisini at vita, at hetta var útvarpsmaður okkara.

– Var tað eisini tú, sum varpaði út í Landskrona á sinni, varð alt fyri eitt spurt, og tá svarið var játtandi, mundi fagnaðurin ongan enda tikið. Tað vísti seg, at hóast áhugin bert var eitt ára gamal, so høvdu hesir longu ognað sær upptøkur frá bæði sjónvarpi og útvarpi frá dystinum, og tá legendariska røddin nú eisini stóð beint fyri teimum, mátti myndatólið finnast fram.

Sjálvir skuldu teir so allir upp á myndina, so myndamaður okkara varð fyri eina løtu noyddur til arbeiðis, hóast hendan løtan mest varð ætlað sum hvíld undan dystinum.

Dystir um vikuskiftið

1. deild menn

Dagf.	Dystur	Dómari
19.09	B36-VB	Dagfinn Olsen
19.09	EB/S-NSÍ	Oddmar Andreasen
19.09	KÍ-HB	Jens P. Brattalið
19.09	GÍ-Skála	Páll Augustinussen
19.09	B68-ÍF	Lassin Isaksen

2. deild menn

18.09	B36-Royn	Petur Reinert
18.09	TB-AB	Petur Skarðenni
18.09	Sumba-LÍF	Jens P. Brattalið
18.09	B71-VB	Regin Egholm
18.09	KÍ-FSV	Tummas P. Olsen

3. deild menn

19.09	Fram-TB	Laurits í Króki
19.09	EB/S-NSÍ	Ransin N. Djurhuus
19.09	SÍ-HB	Suni Johansen
19.09	GÍ-Skála	Johnleif Gerðisá
19.09	B68-ÍF	Petur H. Joensen

1. deild kvinnur

18.09	AB-EB/S	Ikki upplýst
18.09	B36-KÍ	Andrew Christiansen

HB hevur takið í Klaksvík

Tað ber millum til at lesa av hagtølunum, tá hugt verður eftir, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin vanliga hava staðið seg í uppgerðum sínamillum. Tó at tað ofta hevur verið tætt, so hevur HB drigið longra stráðið í Klaksvík seks ferðir í tíggju ár, og so verður spennandi at vita, hvussu leikur fer hesaferð, nú 100 ára føðingardagsbørnini aftur tørna saman.

Annars er vert at leggja til merkis, at EB/Streymur hevur havt gott tak á NSÍ, tá hesir hava vitjað, og at VB hevur havt tað meira enn trupult, tá teir hava verið hjá B36 í Gundadali, tó at talan hóast alt eisini hevur verið um tveir sigrar her.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystum í bestu deildini seinastu tíggju árini.

-jm

	03	02	01	00	99	98	97	96	95	94	Í alt	
B36-VB	2-1	6-0	3-2	1-2	6-1	8-2	4-0	2-1	1-2	-	7-0-2	33-10
EB/S-NSÍ	1-1	1-2	1-0	-	-	-	-	-	-	2-1	2-1-1	5-4
KÍ-HB	1-2	3-2	0-2	1-2	0-0	2-2	0-2	0-1	2-0	0-2	2-2-6	9-15
GÍ-Skála	2-1	2-1	-	-	-	-	-	-	-	-	2-0-0	4-2
B68-ÍF	-	-	-	-	1-2	3-3	1-3	1-1	-	1-0	1-2-2	7-9

KÍ, B36 og HB. Heði á Lakjuni er einsti føroyski leikarin, sum hevur vunnið greipuna við trimum ymsum feløgum

Mynd: Álvur Haraldsen

Heðin eigur sjáldsamt met

Vinstrabeinti klaksvíkingurin í HB er tann einasti føroyski fótbóltsspælarin, sum hevur vunnið the double í trimum ymiskum feløgum

SJÁLDSAMT MET
Jóannes Hansen

Tá ið nýklækta og trífalda meistaraliðið, HB, í morgin fer til Klaksvíkar at spæla landskappingardyst ímóti javnaldranum og størsta kappingarneytanum, verður Heðin á Lakjuni millum áskoðararnar. Fyrrverandi KÍ spælarin og núverandi HB spælarin er leikbannaður. Tá ið Lassin Isaksen sunnudagin vísti honum gula kortið, varð greitt, at Heðin á Lakjuni ikki fór at sleppa upp í part í morgin.

Heðin er leikbannaður hesa ferð. Tí er rættuliga sannlíkt, at hann verður á HB-liðnum, tá ið teir eftir átjanda og síðsta umfarið, fara at taka ímóti FM steypi og gullkrónum í Runavík. Tað fara teir at gera um tvær vikur.

Tað verður neyvan gerandis hjá nøkrum at taka ímóti gulli og skreyti, men Heðin setur sjáldsamt met í ár. Hann er nevniliga fyrsti føroyski fótbóltsspælarin nakrantíð, sum hevur vunnið the double í trimum ymiskum feløgum. Í 1999 var hann á KÍ liðnum, sum vann bæði landskappingina og steypakappingina. Í 2001 var hann á B36 liðnum, sum vann báðar kappingarnar, og nú er hann á HB liðnum, sum sunnudagin krýndi væl eydnaða 100. føðingarárið við at vinna landskappingina. Á Ólavsøku vunnu teir steypafinaluna.

Tað er ongantíð komið fyri áður, at ein spælari hevur vunnið hesar báðar kappingarnar fyri trý ymisk feløg. Tað er eisini rættuliga sjáldsamt, at Heðin bara hevur verið meistari, tá ið hann eisini hevur verið steypavinnari, og at hann bara hevur verið steypavinnari, tá ið hann eisini hevur verið meistari.

Onkrir spælarar hava vunnið the double fyri tvey feløg. Á HB liðnum, sum í ár hevur vunnið báðar kappingarnar, eru tveir spælarar, sum hava roynt hetta. Teir eru Rógvi Jacobsen og Jákup á Borg. Rógvi vann FM og steypakappingina við KÍ í 1999, og Jákup á Borg vann FM og steypakappingina við B36 í 2001.

John Petersen var á B36 liðnum, sum vann FM og steypakappingina í 2001. Í 1996 spældi hann við GÍ, sum bæði varð meistari og steypavinnari hetta árið

Í gamlari tíð - tað vil í hesum førinum siga fram til 1988, tá ið besta deildin varð víðkað til tíggju lið - var tað ikki so vanligt at skifta felag. Tí hevur eingin av gomlu spælarunum upplivað at vunnið the double við fleiri feløgum.

Síðani 1988 er tað fýra ferðir komið fyri, at eitt felag hevur vunnið the double. Tað gjørdi HB í 1988, 1998 og 2003, KÍ í 1999 og B36 í 2001. Tríggum tær síðstu ferðirnar, tá ið eitt felag hevur vunnið the double, hevur talan verið um ymisk feløg: KÍ í 1999, B36 í 2001 og HB í 2004. Felags fyri liðið, sum hesi árini hevur verið meistari og samstundis hevur vunnið steypakappingina, er, at Heðin á Lakjuni hevur talst millum spælararnar. Tað er lítil ivi um, at sjáldsama metið fer at standa í mong ár - um tað nakrantíð fer at verða tikið!

GÍ-Skála:

Nú sær eitt sindur betri út

Gøtumenn, sum ikki hava vunnið tríggjar tær síðstu ferðirnar siga seg ikki kenna nakrar bindingar, nú teir skulu royna at standa seg betri, enn tá ið teir taptu stórt á Skála, har lagið er gott

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Onnur Eysturoyar uppgerðin hesa ferð verður í Gøtu. GÍ legði bragdliga fyri eftir summarsteðgin, men nú hevur stígur verið í. Eftir 2-0 sigurin í Gundadali á B36, hava teir spælt tríggjar ferðir uttan at vinna. Teir hava tapt ímóti KÍ og NSÍ, og teir fingu eitt stig, tá ið teir vóru á Eiði.

Møguleikin fyri heiðursmerkjum minkaði heilt nógv sunnudagin, tá ið GÍ tapti í Runavík. Skála er á bronsuplássinum, og um GÍ fær bilbukt við Skála, so verður møguleikin fyri bronsukrónum og harvið onkrum slagi av altjóða fótbólti næsta ár størri, enn hann annars fer at verða.

– Vit taka ein dyst í senn. Skála smurdi okkum av 4-0 fyrr í summar, so vit kenna styrkina hjá teimum. Kanska tað stendur betri til hjá okkum nú, enn tað gjørdi tá, men vit skulu fyrst og fremst vísa rætta hugburðin og spæla tað, sum vit megna. Vit eiga ikki at hava nakrar bindingar á okkum, verður sagt úr Gøtu.

Eingin gøtumaður er leikbannaður, og tað verður vónað, at allir fara at vera førir fyri at spæla í morgin. Adam hevur ikki vant í vikuni orsaka av vøddaskaða, og Kaj Ennigarð hevur onkrar trupulleikar við knænum. Kortini verður vónað, at teir báðir fara at verða førir fyri at spæla í morgin.

Jónhard við aftur

Skála stendur til at vinna fyrsta settið av heiðursmerkjum nakrantíð. Spurningurin er meiri, um krónurnar skulu verða úr silvuri ella bronsu, heldur enn, um tað fer at eydnast at fáa fyrstu krónurnar.

Tá ið KÍ vitjaði á Skála og fór við øllum stigunum, vóru fleiri av føstu monnunum hjá Skála skaddir ella leikbannaðir. Hesa ferð sær eitt sindur betri út. Pauli G. Hansen er kortini framvegis so mikið skaddur, at tað í gjár varð mett litið sannlíkt, at hann verður við ímóti GÍ. Tað er greitt, at álopsspælarin Pujo ikki verður við, tí hann er leikbannaður.

Dusan Jaic og Nenad Stankovic vóru leikbannaðir ímóti KÍ. Teir eru tøkir aftur. Jónhard Frederiksberg var niðri í Ermasundi í útbúgvingarørindum, tá ið Skála spældi ímóti KÍ. Hann skuldi koma aftur til Føroya í gjár. Hóast hann ivaleyst man vera eitt sindur beindovin, so verður landsliðsmaðurin ivaleyst í Skála álopinum í morgin.

Skaðar og leikbann og dystarsteðgir orsakað av landsdystum hava borið við sær so mikið av órógvi í venjingunum, at tað hevur verið torført at varðveita fokus. Tað hevur kanska aftur gingið út yvir venjingarstøðuna. Men hugurin at spæla er góður, staðfesta teir á Skála.

B68-ÍF:

Tey halda ondini á Toftum

Øssur Hansen er aftur tøkur, nú B68 skal undir annað umfar av bjargingarroyndini

Sigurin í Vági gav eitt lítið andahol til B68, men treytirnar sunnudagin eru ikki linari av teirri orsøk

UPPTAKT
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Toftamenn fingu seinasta vikuskifti loksins orsøk til at smílast, tá tað eydnaðist teimum at taka øll stigini við sær aftur úr Vági.

Tann sigurin í sjálvum sær ger tó ikki tann heilt stóra munin, tí enn eru seks stig upp til ÍF á níggjunda plássinum, og tí er talan enn einaferð um lagnudyst hjá B68. Og hesaferð kanska í enn størri týdningi, tí mótstøðuliðið er júst ÍF.

Tað er tó einki at ivast í, at sigurin seinast hevur givið B68 nakað av sjálvsálitið. Hugburðurin var væl betri, enn hann hevur verið nakra aðra ferð á árinum, og megna leikararnir at nýta sálarliga lyftið rætt, er einki at ivast í, at talan verður um eitt ordans mannfólkaavrik hesaferð.

Og til dystin hevur B68 alt fólkið tókt. Øssur Hansen var ikki við í Vági, tí hann var leikbannaður, men hann er tøkur aftur aftur hesaferð. Eisini Herbert í Lon Jacobsen og Mikkjal Thomassen, sum hava verið skaddur seinastu tíðina. Og eingin av teimum, sum liggja á markinum, fingu gult í Vági, so Trygvi Mortensen hevur frítt val á øllum hillum, tá hann skal seta liðið saman til sunnudagin.

Tríggir eru við aftur

Hjá ÍF sær eisini betri út við fólki hesaferð, enn tað gjørdi seinast, tá teir leiktu javnt móti EB/-Streymi. Fritleif í Lambanum og Høgni Madsen høvdu tá báðir leikbann, men teir eru nú tøkir aftur. Tað sama er Rúni Elttør, sum tá var sjúkur, og tað er upplagt, at hann fer at avloysa Viggo Olsen í verjuni. Viggo er leikbannaður hesaferð.

Og boðskapurin úr Fuglafirði er eins greiður, sum hann er á Toftum. Farið verður eftir stigunum, sum kunnu tryggjað liðnum ímóti beinleiðis niðurflytingini, soleiðis at spenningurin um hetta ikki skal halda sær til tað allarseinasta.